# Krav ella tilboð

BOGI GODTFRED
Journalistur



Fjølmiðlafólk hava brúk fyri tilboðum um førleikagevandi útbúgvingar. At yrkislærd fjølmiðlafólk skulu lúka serlig málslig krøv fyri at fáa starv, er lóggivin mismunur, og slíkum er tíðin langt síðani farin frá

Eg eri púra samdur við Árna Dahl, sum heldur, at fjølmiðlafólk eiga at duga betur føroyskt. Men eg eri ósamdur, tá hann á heimasíðuni hjá Lærarafelagnum sigur, at tað skal setast sum krav, at tey skulu taka serligt eykaprógv í føroyskum fyri at fáa fast starv í føroysku fjølmiðlunum.

Mær hevði dámt betur, um fjølmiðlafólk heldur fingu tilboð enn krøv. Eg havi t.d. leingi hildið, at fjølmiðlafólk – og onnur - áttu at fingið tilboð um eina útbúgving í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum.

Útbúgvingin kundi verið í stigum, og eitt tilboð frá arbeiðsplássinum, sum pláss er fyri í arbeiðstíðini. Sleppið fólki undan at renna aftan á klokkuni og evstamørkum, meðan tey skulu ogna sær ta vitan, ið hildið verður, at teimum tørvar.

Eg ivist í um fólk, sum annars eru væl útbúgvin innan fjølmiðlayrkið, fara at tíma at koma aftur til Føroyar, fara myndugleikarnir at standa fyri teimum við lógini í hondini og krevja eina málsliga útbúgving uttan at rinda fyri hana. Framman undan er lønin innan fjølmiðlayrkið nógv lægri í Føroyum enn t.d. í Danmark, har flestu fjølmiðlafólk verða útbúgvin.

Við kravinum um longri útbúgving fylgir sjálvsagt krav um hægri løn. Program-medarbeiðarar eru bæði í útvarpi og sjónvarpi við fullari akademiskari útbúgving, men einki sæst til, at Fíggjarmálaráðið og kringvarpsleiðslan eru at vika frá kravinum um, at allir programmedarbeiðarar skulu hava somu lágu løn, sum Starvsmannafelagssáttmálin hevur at bjóða, annaðhvørt fólk hava nakra útbúgving ella onga.

Eitt hjálparloysi og annað Fjølmiðlarnir - og kanska serliga bløðini – hava ilt við at útvega fólk við fjølmiðla-útbúgving. Fólk sessast á redaktiónunum við teimum journalistisku evnum, tey hava fingið í vøggugávu og tí málsliga førleika, tey hava fingið á einum miðnámsskúla. Hesi fólk hava lært meira føroyskt enn journalistikk - og tað sæst aftur á tí journalistiska støðinum. Fyri fjølmiðlarnar og tey, ið gjalda fyri hjálparloysið, lesarar, lurtarar og hyggjarar, er tað minst líka álvarsligt sum tann vantandi málsligi førleikin.

Heldur enn at seta fólki krøv, fari eg at heita á Árna Dahl og ta nevnd, hann er formaður fyri um at kanna møguleikarnar fyri at fáa skipað eina útbúgving í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum, ið er soleiðis háttað, at hon kann leggjast oman á ta bachelor-útbúgving, ið fólk koma av Journalistháskúlanum við.

Er eitt undirvísingarumhvørvi skipað, har fjølmiðlafólk kenna seg heima, og sum virðir teirra vitanartørv, so er gaman í eisini at bjóða fólki styttri skeið í málførleika. Men innihaldsliga skal annað og meira til enn ein fremstifingur á lofti.

Trúvirðið má liggja í tilboðnum um eina førleikagevandi útbúgving á universitetsstigi til teirra, sum vilja hava hana. Og ikki bert eitt eiti av einum lógarkravdum málsligum koyrikorti til teirra, sum ikki tímdu at terpa rætttskrivingarreglurnar, meðan tey gingu í barnaskúla.

Eg veit ikki um nakran, sum hevur fingið tilboð um styttri ella longri málsliga eftirútbúgving, alla ta tíð eg havi arbeitt í útvarpi og sjónvarpi. Og tað hevur mangan undrað meg. Men uppaftur meira undrar tað meg, at formaðurin í málstevnunevndini ætlar sær at loysa trupulleikarnar við krøvum. Krøv til fólk, sum í 12-13 ár í fólkaskúla og miðnámsskúla hava fingið kravið: at tey skulu duga føroyskt.

Árni Dahl er lærari á Læraraskúlanum, og eg skjóti upp, at hann og Læraraskúlin leggja botn í Pisaprátið og kanna, hví tað gongur so illa at læra føroyingar føroyskt í føroysku skúlunum. Ta kanningina haldi eg, at málstevnunevndin skal skjóta upp at fáa gjørda, áðrenn hon fer at orða krøv um førleikar, ið skuldu verið sjálvsagdir, áðrenn fólk eru komin so langt, at tey standa við eini yrkisútbúgving í hondini. Eini yrkisútbúgving - í hesum føri eini fjølmiðla-útbúgving - sum teimum skal noktast at brúka, fyrr enn tey hava lært tað, ið tey longu skuldu dugað.

# Grind á Gøtusandi

**Fríggjadagin seinnapart legði ein grind beinini á Gøtusandi**

GRINDADRÁP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fríggjadagin stutt eftir døgurða var ein grind funnin út fyri Borðoyavík. Hon varð rikin suðureftir og inn á Gøtuvík, har hon varð hildin til út á seinnapartin.

Mett var, at grindin taldi um 100 hval, men tá talt varð upp, vóru heilir 142 hvalir merktir til 1358 skinn.

35 bátar vóru við í rakstrinum og umborð á teimum vóru 106 mans, og saman við bátspartunum gevur tað 141 partar. Á landi vóru ikki færri enn 321 mans, so samlaðu drápspartarnir gjørdust 462. Har blivu tríkvart skinn í part.

Haraftrat varð skift til Gøtu, Leirvík og Fuglafjørð, har heimapartarnir vórðu 0,2 skinn.

Reglurnar siga, at býtt verður bert upp til átta partar upp á bátin, uttan mun til um fólkið telur meiri enn so á bátin.

Hetta er triðja grindin sum leggur beinini eftir einari viku.



*142 hval løgdu beinini á Gøtusandi fríggjadagin*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Rædda Maria

DIA ELLINDSSON
Runavík

Henda yvirskrift er ætlað til allar tær rappkjaftaðuu kvinnurnar, sum siga seg vilja javnstøðu, líkarætt og umboðan á tingi.

Hvar eru hesar, tá tað kemur til uppstilling til komandi løgtingsval? Tær halda seg burtur. Kjafturin er læstur. Hví vísa tær seg ikki? Hví bjóða tær seg ikki fram?

Jú, spurningarnir eru nógvir.

Ongi mannfólk fara at forða tykkum í hesum. Tit eru hinvegin meira enn vælkomnar á lista. So vita tit tað.

Vónandi finst ongin rædda Maria aftan á hetta lesarabræv.

Hetta er galdandi fyri allar kvinnur, líka frá uttasta høgra og longst til vinstru.

# Lat sjómannin fáa frið, Magni Laksáfoss

VINJARD JOHANSEN
Varamaður á løgtingi

Størsta vinnan hjá okkum eigur at verða stuðlað fult út. Skal tann meinigi borgarin, og skulu privatar fyritøkur klára seg í framtíðini, eiga vit at halda fæst við høvuðsvinnuna sum hevur stóran týdning fyri land okkara.

Fyri at borgara skulu trívast sum sjómenn, eiga vit ikki at tosað um at skerja ella taka burtur tann skattafrádrátt teir fáa í dag, heldur skulu vit halda fram við hesum, og virða okkara sjómenn fyri tað, ið teir eru fyri land okkara.

Vit áttu at sæð hetta sum ein góðan stuðul fyri landið, og heldur roynt at hildið fast við manningina á skipunum, og fingið áhugan upp hjá ungum røskum monnum fyri sjólívinum.

Landið hevur brúk fyri hesari vinnu, og sjálvandi skal tað hava sín fyrimun fyri tann, sum váðar lív sítt á havinum og er burtur frá familju stóran part av árinum.

Eg haldi at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum veit ikki hvat tað er at verða sjómaður, og hvønn týdning tað hevur at teir fáa hendan skattafrádrátt. Tað er lætt at síggja reytt á pappírinum, men í praksis er nakað annað.

Bátar fara undir veiðu í dag undirmannaðir av tí, at arbeiðsmegi ikki er til vinnuna. At taka frádráttin frá hesari vinnu fer ikki at hjálpa til at finna vantandi arbeiðsmegi.

Eg haldi at Magni átti at kunna seg meira um tann praktiska partin av vinnuni og ikki bert teoretiska partin, aðrenn hann úttalar seg um slík mál.

Føroyar hava brúk fyri sjómanninum, Og sjómaðurin hevur uppiborið góða virðing frá løggevandi valdinum.

Lat sjómannin fáa skattafrádráttin í frið, og hygg heldur eftir tí almanna sektorinum, sum er alt ov stórur.

